# Fólkatingsvalið

fyri valstøðini í Runavíkar kommunu fer fram á hesum støðum týsdagin 08. februar 2005:

Fyri valstaðið í Runavík í Ítróttarhøllini í Runavík fyri bygdirnar:
Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará, Runavík, Rituvík og Æðuvík.

Fyri valstaðið á Skála fer fram í pensionistahúsinum á Skála fyri bygdina:
Skála

Fyri valstaðið í Skálafirði í skúlanum í Skálafirði fyri bygdina:
Skálafjørður

Fyri valstaðið í Oyndarfirði í skúlanum í Oyndarfirði fyri bygdina:
Oyndarfjørður

Fyri valstaðið í Elduvík í skúlanum í Elduvík fyri bygdina:
Elduvík

Fyri valstaðið Funningsfirði í skúlanum í Funningsfirði fyri bygdina:
Funningsfjørður

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 09.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00 - ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

*Saltangará, 25. januar 2005*

**Runavíkar býráð**

Götu Kommuna

# Kunngerð

Tað verður her gjørt kunnugt, at fráboðaða fólkatingsvalið fer fram
**týsdagin tann 8. februar 2005**
**í skúlaauluni við Gøtugjógv.**

**Atkvøðutíðin :**
verður **frá kl. 9.00 og til kl. 20.00**

og verður tá valið endað, so skjótt eingin veljari kemur fram til valavgreiðslu, hóast áheitan.

**Brævatkvøður:**
Tey, ið av ymsum orsøkum ynskja heldur at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, verða biðin um at boða kommunuskrivstovuni frá í seinasta lagi fríggjadagin tann 4. februar 2005 kl. 15.00. Seinasti rættstundis dagur fyri bræv- atkvøðugreiðslu er tó leygardagin tann 5. februar 2005.

**Valkort:**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Hesi verða nú send út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

***Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.***

**Valnevndin í Gøtu**

# Fólkatingsvalið

**Valkort**
Til fólkatingsvalið, sum verður 8. februar 2005, verða valkort send øllum veljarum í kommununi. Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal viðkomandi siga frá hesum á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 4. februar 2005, kl. 15.00.

**Brævatkvøður**
Veljarar í Vestmanna Kommunu, sum sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni til og við 4. februar 2005, kl. 15.00.
Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða frá hesum á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 4. februar 2005, kl. 15.00, ella hjá Jóhan E. Poulsen, valnevndarformanni, tlf. 424211, í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2005, kl. 14.00.

**Valið**
Valið fyri veljarar í Vestmanna Kommunu og á Válinum fer fram á kommunuskrivstovuni í Vestmanna týsdagin 8. februar 2005.
Atkvøðugreiðslan fer fram frá kl. 9.00 til kl. 20.00 ella til støðgur kemur í eftir kl. 20.00.

**Vestmanna Kommuna**

# Lýsing

## um

## fólkatingsvalið 8. februar 2005

**Brævatkvøður**
Veljarar í Runavíkar kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 05. februar 2005.
Eisini ber til at greiða brævatkvøðu á avgreiðsluskrivstovunum á Skála, í Oyndarfirði og í Funningsfirði í avgreiðslutíðunum.
Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 417000 í seinasta lagi 04. februar 2005 kl. 16.00.
**Býráðsskrivstovan í Runavík og avgreiðsluskrivstovan á Skála hava opið til avgreiðslu av brævatkvøðum leygardagin 05. februar 2005 frá kl. 13.00 til 14.00.**

**Valkort**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til fólkatingsvalið, ið skal fara fram 8. februar 2005, verða valkort send øllum veljarum í kommununi.
Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt býráðsskrivstovuni (tlf. 417000) frá í seinasta lagi 4. februar 2005 kl. 16.00.

*Saltangará, 25. januar 2005*

**Runavíkar býráð**

# Avloysari fyri leiðara

**Søkt verður eftir avloysara fyri leiðara í Tilhaldinum**

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara til leiðarastarvið í Tilhaldinum Hugnin í Sandoynni í tíðarskeiðinum frá 15. februar og til 15. september 2005.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna.

Løn sambært avtalu við avvarðandi fakfelag.

Áhugað kunnu fáa meira at vita um starvið við at venda sær til borgarstjóran át lf. 211930.

Skrivlig umsókn skal stílast til Sands kommunu, 210 Sandur, í seinasta lagi 10. februar 2005.

**Sands kommuna**

# Frá Frítíðarskúlanum á Tvøroyri

Innskriving av børnum til skúlaárið 2005/2006 verður fram til 1. mars á

**tlf. 372750**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG

# ÁMINNING til limir felagsins

Vit skulu enn einaferð minna limir okkara á, at limur sum gerst arbeiðsleysur ella sjúkur, kann halda áfram í Felagslívstryggingarskipanini til 67 ára aldur, við at gjalda eitt ávíst mánaðargjald til FA - gjaldingin **skal** byrja áðrenn 3 mánaðar frá tí, at limurin er givin at arbeiða.

Limir fáa nærri upplýsingar við at venda sær til FA á tlf. nr. 312101.

# Kunngerð

Tað verður gjørt kunnugt, at valkort til nýtslu við fólkatingsvalið týsdagin 8. februar 2005 verða send øllum teimum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki hevur fingið valkort, eigur at venda sær til býráðsskrivstovuna til tess at vissa seg um, hvørt hann er á vallistanum. Veljari, sum hevur fingið valkort við villum í, kann somuleiðis venda sær til býráðsskrivstovuna og fáa hetta rættað.

**Vágs býráð**